# – meira enn eitt minni



*Plastnoist til minniskonsert fyri Karl Anton Klein í Kagganum*

*Mynd Ole Wich*

*– Charlie var og er tann coolasti maðurin í øllum universinum. Og ikki at siga coolasti Føroyingurin EVER!!*

á sína fyrstu turné, sum var í Íslandi. Har vit í tvær vikur koyrdu alt Ísland runt og framførdu okkara egna tónleik. Seinni hálaði hann okkum til Danmarkar at upptraðka á festivali í Ålborg og síðani inn í eini upptøkuhøli í Århus. Eitt ár seinni skipaði hann so fyri nýggjum Íslandstúri. Og tað síðsta projektið saman var í januar mánað fyrr í ár. Her upptóku vit eina EP, sum Charlie eisini stóð fyri.

Charlie var 100% dedikeraður til tónleikin og alt umkring. Um ikki at siga 200, 300 ella 1000%. Hann hevði eina tunga byrðu, og vit stuðlaðu honum fult út. Hvønn dag koyrdi hann frá Vestmanna til Havnar og aftur. Hann arbeiddi undir Tórshavnar Kvøldskúla og undirvísti dagin langan, bæði børnum og ungum í øllum aldrum.

Bólkurin frá Vestmanna kom so á pallin. Kann ikki minnast hvat bólkurin kallaðist, men teir vóru fyri at stuðla Charlie, og tað var gott nokk fyri meg.

Hesir fýrarnir kendu seg eisini, ella sum Kaj so væl dámar at notera „Oysini", sum man sigur har vesturi, kendu seg væl við Charlie. Teir høvdu venjingarhøli í Vestmanna í ungu døgum teirra. Og har fingu teir eisini nógv at síggja til hann, afturvið nógvum læruríkum løtum. Allar hesar hugnaligu og stuttligu søgurnar komu fram hóskvøldið undir teirra upptraðkan. Teir framførdu klassikkarar hjá bólkum sum m.a Deep Purple og Bob Dylan. Ein av Charlie'sa all time favorittum.

Kenni tíverri ikki so nógv til vestmenningarnar, men veit, at teir gleddust yvir Charlie. Og tað sigur alt.

Highlightið av kvøldinum var, at Kaj, bróður Charlie, hevði samlað gubbarnar úr 200 og smíðað saman eitt band. Eitt band, sum skuldi representera kultbólkin, Plastnoist. Plastnoist var góði gamli rokkbólkurin hjá Charlie og Kaj. Teir spældu nógv í 90'unum og minnist meg rætt, so innspældu teir tvær plátur saman við Plastnoist, ella fløgur, sum man sigur í dag. Fyrsta fløgan við heitinum, Upp Bara Øxl. Sera góð skal eg líka notera.

„Eg minnist eg fann fyri fyrstu ferð fløguna „Upp Bara Øxl" í samlingini hjá pápa mínum. Sum hann sjálvur ikki visti hann átti. Eg stjól hana so frá honum og byrjaði at lurta. Tað gekk ikki leingi fyrr enn eg ein dagin segði við Charlie, at hetta var ein forbannað feit fløga. Tað næsta, sum hendi, var, at dagin eftir rópti Charlie meg inn á kontórið í ART hølinum, og vildi bert takka mær fyri at hava tikið sín tónleik og sítt verk seriøst. Og av hesum fekk eg so síðstu Plastnoist fløguna við heitinum „21", og hann signeraði hana við at skriva. Til Eyðun, frá KAK 04."

Plastnoist var ein bólkur fullur av góðum og nýpressaðum rokki. Og „sprenfult" av orku, sum Charlie vildi sagt tað.




*Skógvarnir hjá Kaj Klein*

Kaj tók so pallin, sum frontfigurur í æru fyri Charlie og gamlar dagar. Og sum sagt fekk hann eina hond frá gubbunum í punkbólkinum 200, til at fylla pallin út og gera klárt til kultrokkin, sum einaferð livdi í Plastnoist. Og her prógvaðu teir so sanniligani, at Plastnoist livir enn. Íhvørtfall í Kaj.

Eg minnist Charlie hava nevnt beiggjarnar fyrr, og havi eisini møtt beiggjanum Óla, hann koyrdi buss tá. Men Kaj havi eg ongantíð møtt, fyrr enn dagin til minniskonsertina hjá Charlie, síðsta hóskvøld. At síggja Kaj rokka á pallinum, var fyri meg akkurát sum at síggja Charlie. Og hann framførdi við legendariska guitarinum hjá Charlie. Hansara egna spaka. Ein Fender Stratocastor, sum hann doypti til „Regina". Hetta var Charlie'sa eitt og alt. Og bara tað at síggja Kaj skræða tær skitnastu guitar solo'irnar úr Reginu, var sum at síggja Charlie boy himself. Eitt ógloymandi kvøld hetta var.

Tey flestu kendu nokk eisini Charlie og hansara stóru føtur. Hann kom oftani framvið uttan skógvar og uttan hosir. Og hetta var serligani sermerkt, tá hann upptraðkaði á føroyska tónleikapallinum, ella hvar tað nú var. Nakað tað sama hendi hóskvøldið. Mitt undir einari spreingjandi solo, kundi Kaj ikki meira og kastaði skógvarnar av føtrunum og rokkaði víðari. Her merkti man virkuliga samanlíkningin millum teir báðar rokkabbarnar. Tað var intenst, melodiøst og ótrúligani læruríkt at síggja Kaj liva seg fult út í Charlie'sa fótasporum.

Alt í alt, var hetta eitt hugnaligt kvøld við góðum tónleiki og góðum minnum. Hetta var eitt kvøld, Charlie hevði yngst sær frá Kaj fyri fleiri árum síðani, tá teir ungir og frískir búðu í Århus. Og tað skuldi hann fáa. Vit vita øll, at Charlie var besti guitaristurin í heiminum, men aftaná hetta fantastiska kvøldið fann eg útav, at Kaj faktiskt eisini var heimsins besti. Men, sum vit øll vita, er eingin er betur enn Charlie, tí tað sigur hann eisini sjálvur. So Kaj má noyðast við 2. plássið.. hehe.

Eg vil hervið vegna mínum gamla bólk, 48 Pages ynskja vinum, fans og familju okkara djúpastu samkenslu. Charlie var og er tann coolasti maðurin í øllum universinum. Og ikki at siga coolasti Føroyingurin EVER!!

Rock 'N' Roll Charlie, Carlos, The Big Guy. Karl Anton.